# Samstarvið stak væl eydnað

**HF skeiðið í Klaksvík og Studentaskúlin á Kambsdali hava fyri aðru ferð samstarvað við Føroya Tele í Klaksvík um heilt stóra veljarakanning**



*Frá veljarakanningini , sum varð gjørd í hølunum hjá Føroya Tele í Klaksvík seinasta hósdag*
*Mynd: Bárður Lydersen*

VELJARAKANNING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Fyri aðru ferð hevur Sosialurin undan løgtingsvali bílagt stóra veljarakanning. Vit gjørdu tað tríggjar vikur undan valinum í 2002, og í dag kunngera vit enn eina ferð rættuliga stóra kanning. Hesar kanningarnar sigast at vera tær størstu, sum nakrantíð eru gjørdar í Føroyum.

Vit hava valt at gera so stóra kanning, tí at tað aftur og aftur verður sagt í viðmerkingum til smáu kanningarnar, sum verða gjørdar við Føroyum sum einum valdømi, at tað í teimum ikki verður lagt uppfyri, at valdømini eru so ymisk, og at valdømisvaldu tingmenninir eru so ymiskir í atkvøðuprísi, um tað ber til at siga tað soleiðis.

Tað er samtakið FYND, sum hevur havt ábyrgdina av kanningini, og sum hevur staðið fyri útrokningunum, sum skulu gerast í sovornum førum. FYND er eitt samtak av fólkum á samfelagsvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum og lærarum, sum undirvísa í samfelagsfrøði í miðnámsskúlum.

Fyri tveimum árum síðani vóru tað næmingar í studentaskúlanum á Kambsdali og á HF skeiðnum í Klaksvík, sum gjørdu sjálva kanningina. Soleiðis var tað eisini hesa ferð. Lærari hjá teimum flestu er Jóannes Hansen, sum vit kenna frá nógvu teimum seinastu valkvøldunum. Martha Mðri í Klaksvík, sum fyri nøkrum árum síðani var at hoyra í Útvarpi Føroya, tá ið hon las í Aberdeen, er lærari hjá nøkrum næmingum, og hon hjálpti eisini til og vegleiddi hóskvøldið.

Jóannes letur væl at, at tað gekk væl at spyrja næstan 2800 persónar.

– Vit høvdu sett okkum fyri at spyrja 400 í hvørjum valdømi. Hesi tølini eru so vigaði eftir upplðsingum um val fyri tveimum árum síðani og veljaratali kring landið. Vit høvdu umleið hálvt hundrað næmingar, sum ringdu runt landið. Tað eydnaðist at røkka upp á umleið 400 í øllum valdømunum uttan í Sandoyar og Norðstreymoyar valdømum. Har rukku vit ikki heilt upp til tað talið, sum hagtalsliga verður sagt at vera tað, sum slíkar kanningar helst skulu fevna um. Í Sandoyar valdømi spurdu vit umleið ein triðing av samlaða veljaratalinum.

Heldur tú úrslitið er tað, sum fer at vísa seg á valinum tõsdagin í næstu viku?

– Kanningin vísir, hvat veljararnir høvdu atkvøtt, um valið hevði verið undan vikuskiftinum. Eg ivist ikki í, at úrslitið í kanningini hevði verið umleið tað sama, sum tað hevði verið, um hetta var eitt val. Fram til týsdagin 20. januar verður nógv at lesa í dagbløðunum og øllum tí, sum í sambandi við valið verður borið í húsini, og tað verður nógv at hoyra og síggja í útvarpi og sjónvarpi. Tað ávirkar alt samalt veljararnar, og sjálvandi fer tað at ávirka valstríðið, flokkarnar, valevnini og veljararnar, at kanningin hjá okkum vísir, at tað er sera tepurt nógva staðni, heldur Jóannes Hansen.

## Eiga at fáa møguleikan

Allir næmingarnir, sum hesa ferð ringdu og tastaðu inn á teldurnar, hava samfelagsfrøði í HF ella studentaskúlanum. Jóannes Hansen sigur, at tað var eingin trupulleiki at fáa næmingarnar at seta eitt kvøld av til hetta arbeiðið, sjálvt um skotbráðið ikki var so langt.

– Eg haldi, at næmingar, sum hava samfelagsfrøði, skulu vera við í veljarakanning, um tað ber til, og teir síggja hetta sum eina spennandi avbjóðing. Hetta fara teir altíð at minnast og relatera til, tá ið teir í framtíðini fara at hoyra um veljarakanningar. Tað eru viðurskifti og umstøður í samfelagnum, sum lærugreinin upplagt kann geva næmingunum møguleika at nerta við í sambandi við undirvísingina. Eitt nú at vitja í Føroya rætti og løgtinginum og so at gera veljarakanningar. Í so máta er tað ikki so galið, at tað ikki er so langt ímillum valini, heldur Jóannes Hansen og smílist eitt sindur. Hann letur annars framúr væl at samstarvinum við Føroya Tele.

## Føroya Tele við upp á tað

Bæði fyri tveimum árum síðani og aftur hesa ferð var deildin hjá Føroya Tele í Klaksvík við í kanningini. Har er Pól Sundskarð deildarleiðari.

– Tá ið vit vóru við fyri tveimum árum síðani, hugsaðu vit ikki so nógv um, at hetta skuldi verða afturvendandi. Tá ið vit hesa ferð vórðu spurd um at vera við, byrjaðu vit fyrireikingarnar av nðggjum. Nú hava vit brynjað okkum út, so vit í handavending kunnu vera vera við til at gera sovorna kanning í framtíðini.

Saman við teknikarum var Pól Sundskarð saman við HF og studentaskúlanæmingunum, meðan teir gjørdu arbeiðið í hølunum hjá Føroya Tele í Klaksvík (ein partur var í hølunum hjá HF skeiðnum í Klaksvík). Um onkur tekniskur trupulleiki stakk seg upp, so varð hann greiddur upp á standandi fót.

– Tað er eitt upplivilsi at vera við til eitt sovorðið kvøld. Næmingarnir tykjast vita gjølla, hvussu teir eiga at fara fram. Fyrstu løtuna tykist tað sum um, at tað er fjáltur á, tá ið næmingarnir ringja, men tað er skjótt, at teir tykjast vera heilt rutineraðir, og tað sær næstan út sum, at teir ikki hava gjørt annað, heldur deildarleiðarin á Føroya Tele í Klaksvík. Hvussu hann var nøgdur, tá ið hann í gjár frætti úrslitið av kanningini, er ein onnur søga.

# »Lægens Bord« í Føroyum



**Á fyrilestrunum í Føroyum fer læknin at handa »Månedens Buket« og føroyingar kunnu longu nú seta honum spurningar**

VITJAN
*Tíðindaskriv*

Kendi danski sjónvarpslæknin Peter Qvortrup Geisling, hevur ongantíð verið í Føroyum áður, og tí gleðir hann seg ómetaliga nógv til at koma henda vegin. Sjálvt um fyrsti fyrilesturin ikki verður fyrr enn leygardagin 31. januar, so kemur hann við Atlantsflog longu hósdagin. Um veður og vindur er til tað, so fer hann saman við fyrireikarnum at vitja ymisk áhugaverd støð í Føroyum.

Øll kenna henda fryntliga lækna, sum í eitt longri tíðarskeið hevur bergtikið sjónvarphyggjarar í Danmark og Føroyum. Sum fyrilestrahaldari er hann sera væl avhildin, og um ein skal hyggja eftir, hvussu nógv fólk longu nú hava víst fyrilestrunum áhuga, so er eingin ivi um, at tað verður fulsett. Tað verða sum sagt tveir fyrilestrar. Tann fyrri verður í Norðurlandahúsinum leygardagin 31. januar kl. 15.00, og tann seinni á Hotel Norð sunnudagin 1. februar kl. 19.00.

### "Månedens buket"

Í samband við at læknin vitjar í Føroyum, so er meiningin, at hann skal handa eitt blómutyssi til ein føroying, sum á ein ella annan hátt hevur útmerkað seg innan tað føroyska heilsuverkið. Tað kann verða ein lækni, sjúkrasystir, portørur, heimasjúkrasystir, heimahjálpari, o.s.fr. Eisini kunnu fólk innstillast, sum hava t.d. lagt eitt stórt arbeiðið í ein serligan felagskap ella uppgávu. Øll tey, sum skjóta onnur upp, vera við í kapping har 5x1 atgongumerki til "Lægens Bord" verða burturlutað.

Ein serlig nevnd hyggur ígjøgnum øll innkomin brøv, og verður "Månedens Buket" handað á fyrilestrinum, sum verður í Norðurlandahúsinum 31. januar 2004. Uppskot kunnu sendast til iris@iris.fo. Seinasta freist at koma við uppskotum er hósdagin 15. januar 2004.

### Spurningar til læknan

Umframt sjálvar fyrilestrarnir, so fer læknin at svara uppá ymiskar spurningar, sum hann hevur fingið frá føroyingum. Tey sum hava hug at seta spurningar, kunnu senda teir til iris@iris.fo. Teir mest áhugaverdu spurningarnir verða svaraðir undir fyrilestrinum.

### Atgongumerkir í forsølu

Atgongumerkir til Norðurlandahúsið eru til sølu Norðurlandahúsið, ímeðan atgongumerkir til Hotel Norð, kunnu bíleggjast við at ringja til Iris, tlf 456390.

# ítróttur

Nr. 7 • týsdagur • 13. januar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

## Trongligt í blaðnum

Sum lesarin kanska hevur lagt til merkis, so er ítróttturin her í blaðnum ikki heilt so rúgvusmikil í dag, sum hann oftani er týsdagar.

Orsøkin til hetta er sjávlandi fyrst og fremst løgtingsvalið, sum í stóran mun hevur avmarkað plássið her í blaðnum, og tí noyðist partur av ítróttartilfarinum at bíða til mikudagsblaðið.

**-jm**

# FSF fyllir 25 í dag



*Stóran part av fjórðingsøldini hevur Tórleif Sigurðsson verið føroyski fótbóltsbossurin. Fyri tveimum árum síðani takkaði hann fyri seg, og tá tók núverandi formaðurin, Dánjal Andreasen, við*

**Føðingardagurin verður ikki markeraður á serligan hátt, men tað er einki at taka seg aftur í, at Fótbóltssambandið hevur rokkið langt fyrstu fjórðings øldina**

25 ÁRA DAGUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Í dag, týsdagin 13. januar, eru 25 ár liðin síðani, at Fótbóltssamband Føroya varð sett á stovn. Sambært upplýsingum frá FSF skrivstovuni verður einki serligt gjørt burtur úr føðingardegnum. Men tað kann kanska hugsast, at tað seinni í ár fer at verða mint á, at FSF hevur rundað fyrstu fjórðings øldina.

Einki er at taka seg aftur í, at FSF umboðar ítróttargreinina, sum er mest útbreidd og hevur største áhugan í landinum. Fótbólturin hevur stóra undirtøku kring allan heimin, og í Føroyum er einki undantak í so máta.

Føroysku fótbóltsfeløgini eiga FSF, og virksemið hevur verið støðugt vaksandi hesi 25 árini. Fyrrapartin av 25 ára skeiðnum var tað serliga heima á landi, at talan var um vøkstur og miðvíst arbeiði fyri at hækka dygdina. Yngru deildirnar og kvinnurnar funnu tað skapið at spæla og kappast undir, sum tær hava gjørt síðani í áttati árunum. Graslíkisvallirnir komu í áttati árunum, og FSF hevur síðani seinnapartin av áttati árunum lagt nógva orku í at skipa fyri útbúgvingum av eitt nú venjarum og dómarum.

## Altjóða parturin

Í níti árunum hevur vøksturin serliga verið í altjóða virkseminum. Eftir tógvið stríð og arbeiðið í fleiri ár, eydnaðist tað í 1988 at vinna Føroyum limaskap íaltjóða fótbóltssamgonguni FIFA. Stutt eftir gjørdust Føroyar partur av europeisku fótbóltssamgonguni UEFA.

Í 1988 varð fyrsti altjóða skrásetti landsdysturin spældur, og síðani 1990 hava Føroyar verið við í øllum EM og HM undankappingunum. Nú FSF fyllir 25 ár, vísir loggið 91 altjóða skrásettar landsdystir, sum 86 spælarar hava luttikið í. Tað hevði verið hugaligt, um Føroyar á 25 ára stovningarárinum høvdu rokkið upp á eitt hundrað landsdystir, men tað fer at tátta í. Tríggir dystir skulu spælast á venjingarleguni í Spania, og talið á undankappingardystunum, sum tað ikki verður farið undir fyrrenn í heyst, fer í ár neyvan at vera hægri enn fýra ella fimm.

Umframt við A landsliði luttekur FSF í altjóða kappingum við U–19, U–17 og U–15 landsliðum á mannfólkasíðuni, og á konufólkasíðuni verður spælt við A landsliði á Oyggjaleikum og U–19 liði í EM undankappingum.

Dreymurin hjá FSF hevur í fleiri ár verið at taka lut við U–21 landsliði hjá monnum, men higartil er hetta ikki vorðið veruleiki.

Í 1992 luttóku føroysk feløg fyrstu ferð í Europa Cup. Síðani hevur verið spælt á hvørjum ári. Dystartalið í Europa Cup er komið upp á 66, og í Intertoto hava føroysk feløg spælt 23 ferðir.

## Grundarlagið

Fyrsta fyritreytin undir øllum virkseminum hjá FSF er tað arbeiðið, sum verður gjørt í feløgunum. Eisini í teimum hevur talan hesi seinastu 25 árini verið um framburð á mongum økjum. Eitt nú tá ið talan er um fysiskar karmar, støðugar leiðslur, útbúnar venjarar og harvið miðvísa venjing. Elsta felagið er TB, sum var stovnað í 1892. Tvey feløg fara í ár um tey hundrað. Tey eru KÍ og HB.

Fyrsta landskappingin varð fyriskipað í 1942. Síðani hevur verið kappast á hvørjum ári, burtursæð frá í 1944, tá ið kríggið hevði við sær, at tað ikki bar til at fáa bóltar til vega.

Nógvu tey fyrstu árini var tað íSF, sum hevði ábyrgdina av og stóð fyri rakstrinum av fótbóltskappingunum. Tá ið virksemið øktist, varð fótbóltsdeildin hjá ÍSF skipað. Seinnapartin av sjeyti árunum varð tosað um at skipa sersambond. 13. januar í 1979 varð Fótbóltssamband Føroya stovnað. Fyrsti formaðurin var Christian Olsen. Í 1981 gjørdist Torleif Sigurðsson formaður, og fyri tveimum árum síðani varð Dánial Andreasen valdur til formann. Fyrsti og higartil einasti aðalskrivarin í FSF er Ísak Mikladal.

Ítróttarsosialurin ynskir FSF tillukku við 25 ára føðingardegnum.